LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, við Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

TIL SØLU
Nýggj dekk, myskar støddir.
Tlf. 218778

TIL SØLU
Nógvir eykalutir til Ford Escort st.car árg. 96.
Tlf. 218778

TIL SØLU
Opel Vectra árg. 08/97, 90.000 km hevur antispin, fjarstýrd sentrallás, summar- og píkadekk, spildurnýggj til søluna.
Tlf. 259270

ALU-FELGUR TIL SØLU
15" felgur, 4 hol, 115 mm millum hjulboltar. Prísur: 800 kr.
Tlf. 224180

HEILÁRSDEKK
Nýggj heilársdekk á orginalum felgum til Opel Astra til søluna. Stødd 165-70-13. kr. 1500.
Tlf 318283. Mobil 223982

TIL SØLU
VW Passat, árg. nov. 99 í sera góðum standi, til søluna. Hoyr nærri á
tlf. 752159

TOYOTA AVENSIS 1.8 TIL SØLU
vegna keyp av minni bili, árg. mai 03, koyrt 10.000 km.
Tlf. 222684

TIL SØLU
Honda Civic, árg. 92, el-rútar, sentrallás, el-spegl, powerstýring, air-con, sportfelgur, 32.000 kr.
Tlf. 267315

BMW TIL SØLU
Grønur BMW 320 D, 167 HK, árg. 01.09.99 ikki innfluttur, til søluna.
Tlf. 315511/223311

CAMP-LET
teltvognur til søluna fyri kr. 4.000,-
Tlf. 211102

SPORTFELGUR
16" sportfelgur við 205/50 x 16 radialdekk, alt sær út sum nýtt, til søluna, hevur 4 hol, er brúkt eitt summar. Áhugað ring
tlf. 443096

YNSKIST
Mazda 323, helst nýsýnaður og í góðum standi, árg. 88-94.
Tlf. 211034 eftir kl. 17

OPEL OMEGA 1.8cc TIL SØLU
sum eykalutir, koyrt 138.000 km, ring og gev eitt boð.
Tlf. 503715

EYKALUTIR
til Mazda, árg. 87, model BF, til søluna.
Tlf. 503716

TIL SØLU
Takboylar passa m.a. til Opel Astra, bíliga til søluna.
Tlf. 253273/319888

TIL SØLU
Fýra vetrardekk 175/70-13
Tlf. 375298/228398

HONDA ACORD
uttan plátur til søluna fyri 3000 kr
748446

SUMMARDEKK
Fýra summardekk 225/40/18 eru til søluna fyri 4.500 kr.
Tlf. 210518

ESCORT/MONDEO
4 stk. alu felgur 15" við dekkum, 2 195x55x15, 2 205x50x15, til søluna fyri 4.500 kr.
Tlf. 211745

NISSAN BLUEBIRD
árg. 87 til søluna sum eykalutir.
Tlf. 317335/269189

SAAB 9-3
árg. 27.7.99 til søluna um hóskandi boð fæst. Koyrt 65.000 km, er í sera góðum standi.
Tlf. 509353

ELLISAKFAR
Morris Mascot, árg. 76, til søluna.
Tlf. 223498 ella 443058

4 NÝGGJ SUMMARDEKK
175/65R - 14, til søluna.
Tlf. 315811

SPORTFELGUR TIL SØLU
17" felgur 60 mm millum holini, 5 hol, stødd 225/45. Nýprísur 10.000 kr. Prísur 5.000 kr.
Tlf. 424283

CITROEN XANTIA 1.9 TD
árg. 10/95, koyrt 125.000 km, sýnaður 24.9.03. Hevur el rútar framman. Nýggj pikadekk og dekk á felgum og takboylar fylgja við. Bíliga til søluna.
Tlf. 228021

4 SPORTSFELGUR
v/ 4 holum, góð summardekk eru á, 195/50R 15'', til søluna fyri 3.000 kr. Passa til Ford.
Tlf. 503677

VW GOLF
árg 90 til søluna.
Tlf. 374059

BMW 525 TDS
Ein motorur til BMW 525 TDS til søluna. Hevur koyrt 250.000 km. Aðrir lutir til BMW E34 seriuna eisini til søluna.
216409

FORD MONDEO 1.8i SEDAN
árg. 96, 108.000 km, nýsýnaður, sproytaður í fjør. 16" sportfelgur, annlegg og eyka felgur við pikadekkum. Biliga til søluna.
Tlf. 504834

NÝGGJ DEKK TIL SØLU
Nøkur nýggj dekk til solu 165-14 á 175,- stk. 215/70-15 á 300 stk. 175/65-14 á 250,- stk. 205/60-15 á 200,- stk.
tlf. 220205

SPORTFELGUR
við summardekkum 5 hol, stødd 205/70 R15. Passa m.a. til Kia Carneval.
Tlf. 448051

HONDA ACCORD 2.0 ST
til søluna, árg. 97, 17" sportfelgur + vanl. felgur, cd-spælara, vael viðfarin.
Tlf. 322573/222573

SUMMARDEKK Á FELGUM
stødd 205/50 R16. Passa til Toyota Carina, Avensis, 5 x 100 millum hjólboltar.
ring 264505

YMIST TIL HONDA CIVIC 98
2 hurðar. Kúfangari framman við innbygdum spoylara. Kúfangari aftan. Baklyktir. Fjaðrar til stoytdoyvara, til søluna.
Tlf. 314944/580604

REYÐUR BMW
árg. 1990 til solu. Prísuppskot 38.000. Er nýsýnaður.
Tlf. 371094 ella 371194

PEUGEOT 206 GTI
2.0 148 HK, koyrt umleið 109.000 km. Boð undir 110.000,- ongan áhuga.
Tlf. 260233 ella 441745

BILUR YNSKIST
Hevur tú ein bil, sum er til solu fyri uml. 50.000 kr.
Ring 250348, Vágur

LAST TIL MAZDA B2500
bíliga til solu. Áhugað kunnu ringja á
tlf. 216114

SPORTFELGUR
15" sportfelgur við góðum summardekkum 205/50-15 til solu fyri 4.000 kr. Felgurnar hava 4 hol, og passa m. a. til Peugeot 306.
Tlf. 222233

Arbeiði

SØKIR KJANS
50 ára gamal íslendingur, sum býr í Føroyum, søkir kjans við føroyskum fiskiskipi, útróðrarbáti ella farmaskipi. Eg havi siglt í 30 ár, bæði við trolara, línuskipi og útróðrarbáti. Eg havi eisini siglt sum kokkur.
Tlf. 503297

FLISEARBEJDE
Mindre indedørs flisearbejde udføres.
Tlf. 228058

TILBOÐ YNSKIST
upp á at leggja brotflísar á eitt tún.
Tlf. 210192/421192

ER TAÐ NAKAR
sum hevur brúk fyri reingerð, so ring til mín. Eg eri ein tilkomin kvinna og búgvi í Miðvági.
Tlf. 508850

ALT MÁLARAARBEIÐI
verður gjørt skjótt og væl. Ring og fá eitt boð.
Tlf. 250387

TELDUHJÁLP OG RÁDGEVING
Serkon telduhjálp og ráðgeving kann fáast millum kl. 09.00 og 16.00 allar yrkadagar. Umleið 50–75% biligari pr. tíma.
Tlf. 317947 ella 222254

EG ERI EIN 11 ÁRA GAMAL DRONGUR
sum søki arbeiði í Havn eftir skúlatíð. Ringi
Tlf. 266575 Sonni

Barnaansing

DAGRØKT
Dagrøkt søkist til 10 mánaðar gamlan drong í Havn nakrar tímar um vikuna
282528

Barnaútgerð

KOYRISTÓLUR
Lítið brúktur koyristólur við posa, hann er í sera góðum standi, bert 1200 kr.
Tlf. 320880 ella 226256

TIL SØLU
Træ grulvigarður við teppi til søluna.
Tlf. 441804 eftir kl. 18

BRIO VOGNUR
og koyristólur bíliga til solu. Vognurin er gráur og koyristólurin myrkablár.
Tlf. 243209

TIL SØLU
Combi barnavognur BMO. Hevur regnhettu og flugunet, 1200 kr. Barnasong við tveimum madrassum, ljóst træ 750,- kr. Baðikar við borði 400,- kr.
Tlf. 267315

BARNAVOGNUR TIL SØLU
Sera vælhildin ein merkinum Basson, til solu fyri 2000 kr.
Tlf. 421161/250445

BILSTÓLUR
0-18 kg. til solu. Bert brúktur til eitt barn. Nýprísur 1.295,- nú 400,-
Tlf. 744418

KLAPPSTÓLUR
Ein tvillinga klappstólur við galesju til solu fyri 500 kr. Punttutur, í góðum standi.
Tlf. 313424/257187

Bátaútgerð

YNSKIST
Glastrevjabátur ynskist millum 26-30 fót við ella uttan fiskiloyvi alt hevur áhuga.
Tlf. 250950 ella 507311 eftir kl. 17

BÁTUR TIL SØLU
Ein útróðrarbátur, við fiskiloyvum og íslansdloyvi, í bólki 4A til solu um hóskandi boð fæst. Báturin er yvir 120 kubikk.
Tlf. 312238

TIL SØLU
Glastrevjabátur 33 fót, verður seldur við ella uttan fiskiloyvi, um hóskandi boð fæst.
tlf. 448105

TOSKATRÁÐA VIÐ ØLLUM
Hjól, tráða, pilkur og eskja full av beitum, húkum og tilgjørdari útgerð. Væl viðfarið. Til solu fyri 1.200,-
Tlf. 215000

PIONER JOLLA TIL SØLU
Pioner jolla við dupultum botni við 6,5 hesta Evinrude leysamotori, er til solu.
Tlf. 373278

TIL SØLU
4 metur long glasfipur jolla við ratti og regulering til páhangsmotor, vælegnað til 10-20 HK motor, sera bíliga til solu.
Tlf. 220033

TIL SØLU
Ein 20 fót køli og frystikonteynari til solu.
Tlf. 211704

10-MANNAFAR
við fiskiloyvi og øllum hentleikum til solu fyri 68.000 kr.
Tlf. 582040

BÁTA TRAILARI TIL SØLU
Variant 1000 BB til 22 fót bátar. (6 x 2 mtr). árg. 6/2002 til solu fyri 19.800,-
Tlf. 214536

TIL SØLU
Motorur MD50 110 HK, Volvo 1 Bourg Waerner, gear 3:1, bíliga til solu.
Tlf. 221519

BÁTUR TIL SØLU
Eitt 7-mannafar við 14 HK Johnson páhangara til solu.
Tlf. 741225

EIN AQUASTAR 33 FÓT
við 5 snellum og línuspæli. Báturin hevur ikki last. Mesta fer 13 míl.
Tlf. 228741 - www.batur.fo.

Bingo

SUÐUROYINGAR
Gott bingo verður í skúlahøllini í Trongisvági mánadagin 26. apríl kl. 19, nærri lýst seinni.
Tvøroyrar Svimjifelag

STÓRT BINGO Í HVALBA
Týskvøldið 13. apríl klokkan 19.30 verður stórt Bingo í Roynhøllini. Hvøvðsvinningur. Vikuskiftisferð til Danmarkar við Atlantsflog.
Royn

GOTT BINGO
verður í VB-húsinum tórsdagin 8. apríl kl. 16.00.
VB

BINGO
verður í VB-húsinum 28.4.2004.
Meinigheitshúsið í Vági

GOTT PÁSKABINGO
verður skirisdag kl. 20.00. Millum annað at vinna páskaregg, kjøt, gávukort, kurv og krov. Eisini verður 20 kr. spæl og bingola.
Tórshøll

PÁSKABINGO Á STRONDUM
Gott páskabingo verður 2. páskadag kl. 16.00. Burturlutað verður m.a. ein Apex ferðaseðil við Maersk Air til Danmarkar, ein neytaaftur fjórðingur, gávukort á 1.000 kr. og turr føroysk tjógv. Eisini verða lúkur at lata upp.
Strálan

SUÐUROYINGAR
Bingo verður í Framtíðini onskvøldið 14. apríl kl. 19.30 og 5. mai kl. 19.30. Nógvir góðir vinningar.
KFUM-skótarnir

FRÁ SPASTIKARAFELAGNUM
Gott bingo verður í Pállstovu 2. páskadag kl.16. At vinna gávukort á 75,- 150, og 500 kr., á lutaseðli 14 gávukort á 100 kr. og eitt á 3000 kr. frá Smiril Line,15 plátur á 100 kr., eykaspæl, koyring heim. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Spastikarafelagið

FRÁ EYDNUNI
Gott bingo verður 2. páskadag kl. 16.00. Hvøvðsvinningur gávukort frá Smyril Line á 2.000 kr. Eykaspælið 800 kr. Drigið verður millum spølini.
Eydnan

GOTT
verður í Glæmuni í Kvívík mánakvøldið 19. apríl kl. 19. 12 plátur 100 kr. Hvøvðsvinningur á lutaseðli gávukort á 1000 kr. Drigið verður millum spølini. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Glæman

Bøkur

LADEMANNS LEKSIKON
A til K fæst við at avheinta tað.
Tlf. 443237

Burturm. /funnið

BURTURMIST
Hevur nakar funnið mína mannfólka/silvur hálsketu, sum eg misti 20. februar, so vinarliga ring
tlf. 252623

SONY DIGITAL KAMERA
burturmist í Tórshavn sunnuánttina 28. mars. Um nakar hevur sæð tað, vinarliga ring til mín. Finningarlon verður latin.
Tlf. 221486

GLOYMT
Tá ið Margretha Eidesgaard fór til gravar, gloymdi onkur einar leðurhandskar. Í handskunum stendur »E.S.«. Tann, ið saknar teir, ring
tlf. 221275

LEIKUR BURTURMISTAR
Sunnudagin 14. mars fór eg við bussi úr Skálabotni til Havnar. Heimkomin varnaðist eg, at bleytu baðidýrini hjá mær vóru vekk. Hevur tú funnið pingvinina, fiskin og krabban, vinaliga ring til mín.
Tlf. 314820/319820, Lý

Býli

KAMAR TIL LEIGU
í Vesturbýnum við atgongd til køk, bað og vaskimaskinu.
Tlf. 221158/313799

ÍBÚÐ YNSKIST
til framleigu í Keypmannahavn frá 01.08.04 til 30.06.05.
Tlf. 317147/263720

ÍBÚÐ TIL LEIGU Í KBH.
1 ver. møblerað íbúð við hava í Gadevang til leigu. Íbúðin liggur beint við City 2 og Høje Tåstrup st. Kostnaður 1.500 kr. um vikuna.
Tlf. 312028/215028

SKALT TÚ TIL HAVNAR
og vil búgva væl, so er møblerað íbúð til leigu, 112 fermetrar v/ øllum hentleikum, vikuskifti ella styttri tið. 700 kr. um dagin, seingjarklædir 50 kr.
Tlf. 218664

HÚS TIL LEIGU
Møblerað hús í Fuglafirði til leigu frá 15. mai til 1. aug. Møguleiki fyri at leiga í bæði styttri og longri tíðarskeið.
Tlf. 265044, t-post: mss@post.olivant.fo

HÚS TIL LEIGU
Hús í Havnini til leigu í 1 ár. Húsini liggja vael fyri. Kostnaður kr. 6.000,- um mór. uttan ljós og hita.
Tlf. 228148 - 223299

TÍDARAVMARKAÐ LEIGUMÁL
Stór fult møblerað íbúð við øllum hentleikum til framleigu í Havn beinanvegin fram til 1. juli 04.
Tlf. 33248045/20698045 eftir kl. 17

SETHÚS Á TVØROYRI TIL LEIGU
100 fermetra møblerað sethús á Tvøroyri til leigu. Fritt og gott útsýni. 2 stovur, køkur, wc-bað, 3 verilsir, vaskikjallari og hjallur.
Tlf. 504370/+45 61703990

ÍBÚÐ TIL LEIGU
80 fermetra ljós og góð loftsíbúð í Havn til leigu. Altan, stova, 3 kømur, køk og bað.
Tlf. 504370/+45 61703990

ÍBÚÐ TIL LEIGU
30 fermetrar, til eitt fólk ella par. Stór stova, køkur, baðíverilsi, eigin inngongd til leigu frá 01.05.04 3.500 kr. við el og olju. 1 mór. depositum. Skriva til Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 1809

HÚS TIL SØLU
Sethús í Miðalsbrekku í Vestmanna til solu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 225987/424760

ÍBÚÐ YNSKIST
Vit eru 2 friðarligar gentur sum ynskja íbúð í Havn/Argjum eftir summarfrítíðina. Kann nakar hjálpa okkum við hesum? Vinarliga ring
tlf. 229636/455286 ella +45 98690105

ÍBÚÐ YNSKIST
Maður søkir íbúð 30-60 kvm í Suðurstreymi.
Tlf. 222075

ÍBÚÐ YNSKIST TIL LEIGU
í Tórshavn, helst hava 2 kømur.
Tlf. 226021 best eftir kl 14:30

ÍBÚÐ Í KEYPMANNAHAVN
Íbúð ynskist til leigu í Keypmannahavn skjótast gjørligt.
Tlf. 509999

HÚS Á ARGJUM
til leigu í styttri ella longri tíð, frá 1. mai.
Tlf. 213571

ÍBÚÐ ELLA HÚS Í TÓRSHAVN YNSKIST
Tveir ungir eysturoyingar ynskja at leiga eina íbúð ella eini hús í Tórshavn skjótast gjørligt. Báðir hava fast arbeiði.
Tlf. 507572/447602

FRÍTÍÐARHÚS Í NÓLSOY
Slappi av í Gomlu Petersen-húsinum (nýrenoverað).
Tlf. 222327

GOYMSLUBYGNINGUR
í Haraldssundi til leigu. Stødd 20 x 8 og hæddin millum loft og gólv er 4 m. Møguleiki er eisini at leiga helvtina. Liggur vael fyri.
Tlf. 456787 ella 756787

ÍBÚÐ
Ung kvinna við einum barni søkir íbúð á Norðasta Horni ella í Tórshavn. Fari vael um og gjaldi til tíðina.
tlf. 580856

ÍBÚÐ YNSKIST
Par mitt í 20'unum søkir íbúð, helst nærhendis miðbýnum, men alt hevur áhuga. Hava fast arbeiði, gjalda til tíðina og fara væl um.
tlf. 211477/225969

ÍBÚÐ/KAMAR
Tilkomin maður ynskir lítla íbúð/kamar til leigu í Tórshavn, sum skjótast.
tlf. 509134

Dansur

DANSUR
verður í Jómsborg 2. páskakvøld. Húsið letur upp kl. 22.00.
Nevndin

DANSIFELAGIÐ FRAGDIN Í HÓSVÍK
Til limirnar í dansifelagnum Fragdini í Hósvík. Avdansiveitslan verður í bygdarhúsinum í Hósvík leygardagin 17. apríl kl. 19.30. Matskrá: Aspargessuppa, oksakjøt við tilhoyri og omaná ísur við frukt. Morgunmatur: Suppa við flutes. Kostnaður 75,- pr. persón. Tilmelding í bygdarhúsinum sunnudagin 28. mars, annars á tlf. 422425 Ida, 422291 Elin, 422368 Ann, til og við týsdagin 14. apríl kl. 20.00.
Dansifelagið Fragdin

Dýr

GOLDEN RETRIEVER
Tíkahvølpur, 8 vikur gomul, til solu.
Tlf. 318020 eftir kl. 18

DVØRGAKANIN
8 mðr. gamal hann til solu.
Tlf. 310117

HEY
Eg havi tvey búr til dvørgahamstrarar við tilhoyri til solu.
Tlf. 265704 ella 321213, Jóna

HEY GÓÐU DJÓRAVINIR
Vit eru 6 fittir hundahvølpar, vit eru 5 vikur gamlir. Tveir eru hvítir og fýra eru brúnir og hvítir. Mamma okkara er sera barnavinarlig. Vit duga at eta og leppa. Vit kunnu heintast um 2 vikur.
Tlf. 422175/722175

CHINCHILLUR TIL SØLU
2 Chinchillur við búri til solu fyri 2.000,- kr.
Tlf. 220879

UNDULATER
Undulater sælges.
Tlf. 228058

DVØRGAHAMSTRARAR
Tveir fittir dvørgahamstrarar við búri til solu.
Tlf. 220093

HEY!
Mín ketta hevur lagt ein kettling, mamman er reinlig og ógvuliga rólig. Ert tú áhugað, vinarliga ring
253652

4 FITTIR HUNDAHVØLPAR
Vit eru 4 fittar hundahvølpar (allir hundar). Vit duga at eta og drekka, klárir at geva. Vilt tú eiga onkran av okkum, ring so á
tlf. 228186

BORDER COLLIE HVØLPAR
Sera góðir Border Collie seyðahundahvølpar til solu.
Tlf. 262851

ÍSLENDSK RYSSA
9 ára gomul, væl ættað, 5-gongd ryssa til solu.
Tlf. 210500

Fundir

ALZHEIMERFELAGIÐ
hevur aðalfund tann 25.apríl í Læraraskúlahollini. Skrá samb. lógum felagsins. Mál til viðgerðar á fundinum skulu sambært viðtokum felagsins verða nevndini í hendi í seinasta lagi 8 dagar fyri fundin.
Nevndin

SUÐUROYAR NORÐARA BJARGINGARFELAG
Aðalfundurin verður sunnudagin 18. apríl kl. 16.00 í Ólavstovu í Liðini. Skrá samb. lógini. Innkomin mál – lógarbroyting. Er fundurin ikki viðtokuførur, verður eykaaðalfundur 1/2 tíma seinni.
Nevndin

FUGLFIRÐINGAR
Ársaðalfundurin hjá ÍF verður á Muntra mikudagin 14. apríl kl. 20. Skrá smb. lógini.
ÍF

ÁRSAÐALFUNDUR
VÍF hevur ársaðalfund í miðhøllini sunnudagin 2. mai 2004 kl. 16.00. Skrá sambært lógini.
VÍF

Húsarhaldstól

TIL SØLU
Kuldaskáp v/ frystiskápi í neðra, h. 120 cm. x b. 53 cm, x d. 56 cm. Prísuppskot 3.000,- Candy vaskimaskina 2.500,- kr.
Tlf. 223340/310512 eftir kl. 16

TIL SØLU
Zanussi 1202 vaskimaskina til solu. 3.000 kr. (nýggj 5.200,-) lítið brúkt.
Tlf. 213571

ZANUSSI VASKIMASKINA
sum nýggj, til solu fyri 1.500 kr.
Tlf. 255096

Innbúgv

GAMALT TIL SØLU
Tvær messing lampur, tvær russiskar temaskinur, myskt úr messingi og silvuri.
Tlf. 448271

DUPULTSONG
170 x 200 við tveimum madrassum til solu fyri 1.400,-
Tlf. 311267

LEÐURSOFUR
Tvær leðursofur trý + tvey og eitt sofaborð til solu. Alt fyri 750,-
Tlf. 312844 ella 212844

YMIST TIL SØLU
myrkt hornskáp v/ ljósi. Prísuppskot 2.500,- Sofaborð, glasplata v/ myrkum beinum prísuppskot 1.000,- kr. Box song v/ topmadrassu 140x200 kr. 1.000,-
Tlf. 223340/310512 eftir kl. 16

HORNASOFA
Hornasofa til solu fyri 2.000,- lútað træ við pútum.
tlf. 213571

TIL SØLU
Klædnaskáp, ljóst, trælitað H. 178 B. 100 D. 50. Skrivstovustólur við armleni, stórur, nýggjur, leður. Bíliga til solu.
Tlf. 312916

BÍLIGA TIL SØLU
Dupultsong við galvi og náttborðum í teak 150x205, vælhildið.
Tlf. 312916

GLASSKÁP
(frá Ikea) til solu fyri 300,- kr. 3 hillar, stálbein, stødd: b. 45 cm, d. 35 cm. og hædd 170 cm.
Tlf. 310556 ella 510556

TIL SØLU
1 stk. Bolár 32/32 endareol til køk, keypt frá Klement Petersen, feilkeypt.
Tlf. 314640

YMIST TIL SØLU
Sofaborð, skenkur, spegl, bókreol, bonkur bíliga til solu. Nærri fæst at vita við at ringja
tlf. 272082/321265 eftir kl. 18

HORNASOFA
Til solu fyri 500 kr. Ring
Tlf. 312858

Lutaseðlar

LUTASEÐLASOLAN
hjá ÍF-stuðlum. Notarius Publicus hevur drigið hesar vinningar í SMS leygardagin.
1) Málningur 1100
2) Ferðaseðil 1608
3) Ferðaseðil 625
4) Ferðaseðil 913
5) Lamb 995. Vinnararnir verða bidnir um at venda sær til Steinbjørn í Lambanum tlf. 558105. Takk fyri stuðulin.
Í-Stuðlar

HEIMABINGO Í VÁGI
Hesi hava vunnið í heimabingo hjá 7. flokki í Vágs skúla:Telefon nr. 373993, 373478, 373492, 373274, 373796, 574195, 374136, 373451, 373819, 373646. Takk fyri stuðulin
7. fl. í Vágs skúla

FØROYSKA SJÓMANSMISSIÓNIN
Nr. 1) 5702, nr. 2) 0160, nr. 3) 1622, nr. 4) 6661, nr. 5) 3439, nr. 6) 5180, nr. 7) 5515, nr. 8) 0931, nr. 9) 8179. Takk fyri stuðulin.
Tlf. 470000 kl.10-16

1.p Á KLAKSVÍKAR HF-SKEIÐ
1) 1652 2) 5010 3) 3354 4)7414 5)4537 6) 7040 7) 5108 8) 5990 9) 6362 10) 0716 11) 0502 12) 5275 13) 7272 14) 7144 15) 3205 16) 6018 17) 5939 18) 7197 19) 3594 20) 4052 21) 5668 22) 5107 23) 5493 24) 6340 25) 3206 26) 6164 27) 7368. Takk fyri stuðulin.
Tlf. 456412 til kl. 16 og 250941 eftir kl. 16

Matur

TIL SØLU
Íslendskur lomvigi og turrur fiskur til solu.
Tlf. 361970/509779

Pløgg

MØTTIL TIL SØLU
Ein nýggjur óbrúktur møttil við hettu til føroyskan kvinnubúna, til solu fyri 2000 kr.
Tlf. 317638 eftir arbeiðstið

TIL SØLU
Broderað fyriklæði og turriklæði til vaksin og børn til solu.
Tlf. 333049

NÝGGJUR STIMI
bíliga til solu.
Tlf. 318096, fyrrapart

Samband

GENTA, 26 ÁR
vil gjarna hava samband við eldriligan mann, nøkunlunda á sama aldri. Sjálv eri eg ógvuliga góð við børn og djór. 101% tagnarskylda. Helst mynd og tlf. nr. í fyrsta brævi. Skriva til Sosialurin, box 76, 110 Tórshavn
Bill.mrk. 1806/2

Sjavs

SJAVSKAPPING
verður týsdagin 13. apríl kl. 19.00. Øll eru vælkomin.
Tórshøll

Súkklur

HONDA MOTORSÚKKLA
árg. 1977 við uppruna svørtum nummarplátum til solu. Súkklan er 125 cc.
Tlf. 211102

APRILIA RALLY
skutari, koyrt 8.500 km til solu fyri 9.000,-
Tlf. 211102

CROSS TIL SØLU
Derbi Senda R til solu um hóskandi boð fæst.
tlf. 258809/311604

APRILIA RX50 TIL SØLU
Koyrir vael, orginalt útstoyt fylgir við.
Tlf. 422826 ella 262760

KONUFÓLKASÚKKLA
við ella uttan súkklustóli ynskist bíliga.
Tlf. 262797

TIL SØLU
Yamaha Cross 250 ccm bíliga til solu.
Tlf. 222806 eftir kl. 17

SKUTARI TIL SØLU
Ein skutari av slagnum P. G. O í góðum standi - sær vael út - 2 ára gamal, til solu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 220933 ella 442120

PUCH MAXI
til solu fyri 3.000 kr.
Tlf. 271998/318994

SUZUKI GSX 750 F
árg. 92 til solu. Hon er vael viðfarin.
Tlf. 222573/322573

HONDA
(TRX 450 FE) fore man foretrax, til solu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 506553

APRILIA RX50
til solu, 2 ára gomul. Í sera góðum standi. Nýggjur motorur ísettur. Ring og hoyr nærri.
Tlf. 260986 eftir kl. 15

APRILIA RX50 TIL SØLU
70cc og tað orginala útstoyti fylgja við, koyrir vael og sær gott út. Til solu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 509383

Teldur

SPØL SPØL SPØL
Nógv X-box og Playstation-2 spøl til solu fyri hálvan pris – + eitt eyka joystik. Seld hvør sær, ella øll fyri 1.000 kr. Ring nú.
Tlf. 448097

PLAYSTATION II
Ein vælhildin Playstation II við 2 joystikkum og memorykort til solu til hægstbjóðandi, við í prísinum eru 22 av teimum nýggjastu spølunum. Ring og gev eitt boð og ger kvetti.
Tlf. 254668

SPØL TIL SØLU
Nintendo gamecube, The Italian job og F1 2002! Ikki útpakkað, til solu fyri 400 kr. stk.
Tlf. 503716

DELL TELDA
Dell telda til solu 2,4 GHz, 512 RAM, 120 GB, nVIDIA GeFORCE MX 420, 15" Flatskerm, DVD-Drev, Fløgu brennara, HP Photosmart 7150 printari. Til solu fyri einans 9000 kr.
bugvi@post.olivant.fo ella 505700 (aftaná kl. 17)

TELDA TIL SØLU
Windows XP 1.5 GHz, 256 Ram, 10/100 Mb Netkort, Modem 40 GH, Tráðleyst tastatur og mús, 2 hátalarar v/ sub, DVD, CD-brennari, nógv spøl, 19" skerm. Prísur 8.000 kr.
Tlf. 314699/504893

TELDUSPØL TIL SØLU
Enter The Matrix 350,- Age of Empires 150,- Hazard 150,- og ein DVD filmur Godzilla 100,-
Tlf. 263880

DELL INSPIRON
DELL Inspiron 8100 - 1.2 ghz - 384 ram - brennara - 15" skerm - 2 battari. við 11 mbit accesspointi og tráðleysum netkortið alt fyri 11.000 kr
Tlf. 745101

TIL SØLU
Telda 350 MHz, 64 MB-Ram, 8,4 GB harddisk v/ DVD spælara og cd-brennara. Norton Antivirus 2004 fylgir við. Til solu fyri kr. 3.000,-
Tlf. 504163

TELDA TIL SØLU
AMD Athlon 1,1 GHz, 512MB RAM, 60 GB Harddisk,ATI Redeon 64 MB skermkort, Creative 5,1 ljóðkort, forsterkari við 5 hátalarum + bass, CD-RV, DVD, 21" skerm, Cannon printari, netkort, ISDN kort. Nógv spøl fylgja við. Til solu fyri 7.500 kr.
Tel. 226322

TELDA TIL SØLU
Pentium 4 2,4 Ghz, 1 gb ram, 120 GB hardisk, CD-brennara, DVD drev, 17" Flatskerm, 4 x USB 2,0 Firewire, Windows XP Pro og Office 2003. til solu fyri einans 9000,-
Ring 218414

Tónleikur

EL-GUITAR TIL SØLU
Óbrúktur 1/2 ára gamal Yamaha AEX500 hálv-akkustiskur guitar við tveimum innb. mikrofonum (Magnetic Pickup og Piezo Pickup), einum 15 W VOX forsterkara og fótstativi til solu. Ljóðar einastandandi. Nýprísur 6500 kr., til solu samlað fyri einans 4500 kr.
Tlf. 260590, Saltangará

SPILDURNÝGGIR HÁTALARAR
Rættuligt krás fyri oyruni. Surround system 5 partar. 2 miðalstórir gólvhátalarar, 2 satellit surround hátalarar og 1 centerhátalarar , litur bók - kunnu spæla upp til 150 watt. Merki KODA. Selist samlað uttan forsterkara fyri einans 1900 kr.
Ring 317376

TIL SØLU
Yamaha orgul til solu.
Tlf. 316114/313285

ORGUL ÚR GJÁAR KIRKJU
Gjáar kirkja hevur fingið nýtt orgul, og tí selja vit gamla orgliið til hægstbjóðandi. Seinasta freist at lata boð inn er 15/4-04, kl. 20. Orgliið kann síggjast og roynast í kirkjuni.
Tlf. 216586, Gjáar kirkja

BILANLEGG
Sony minidiskavspælari + cd box, 10 fløgur + 2 forsterkarar 4.500 kr.
Tlf. 211745

EITT YAMAHA YC 450
og ein forsterkari Scharma v/ Lesley bíliga til solu.
Tlf. 444654/511080

FORSTERKARI TIL SØLU
JBL bilforsterkari 2 x 150 w ella 1 x 300 w 1500 kr.
Tlf. 222062

BÍLIGA TIL SØLU
Philips orgul í teak, lítið. Philips radio í trae, stórt, gamalt. Philips radio við dupultum banduppatakara, plátuspælara, 2 hátalarum, svart. Hillakassi til bond, plátur, anlæg, ljósur, trælitaður.
Tlf. 312916

TIL SØLU
Eitt Kawai stovuorgul til solu. Ring og gev eitt boð.
Tlf. 443040

Út- & Sjónvarp

STEREOANLEGG TIL SØLU
Eitt sera vælhildið svart Grundig MC 10 við útvarpi, CD-avspælara og banduppatakara, 2 stk. 35 watt hátalara og fjarstýring til solu fyri 900 kr.
Tlf. 260590, Saltangará

32'' SJÓNVARP + TELEVARP
Eitt Philips Widescreen 32'' sjónvarp við borði til solu. 1 ára gamalt. Nýprísur 16.000 kr. Til solu fyri 10.000 kr.
Tlf. 214163

Ymiskt

STÓRUR MARKNAÐARDAGUR
verður leygardagin 10. apríl í gamla radiohandlinum hjá Eyðun Joensen. Nógv gott at fáa. Byrjað verður kl. 10.00.
Vágs Kappróðrarfelag

TIL SØLU
17 brúkt husmor vindeygu 100 x 120, 3 brúkt 48,5 x 98,8, brúkt altanhurð 88,8 x 212 (hgra út) og brúkt úthurð 95,8 x 213,5 (vinstra út).
Tlf. 313038

OVERLOCK MASKINA
Ein industri overlock maskina í góðum standi til solu.
Tlf. 456735/257459

PARABOLSKIPAN
Parabolskipan við analogum og digitalum tunara, bíliga til solu. Veggjastativ fylgir við.
Tlf. 218385

MÁLNINGAR
Um hóskandi boð, fæst selji eg nakrir málningar. Málað hava: Eyðun Dal-Christiansen, Thomas M. Smith & Pauli Vang. Eisini eru 3 litografi av Zacharias Heinesen. Málningarnir kunnu síggjast á: www.skulin.fo/nesvik/is undir: Eldri føroyskar myndir. Boð kann gevast á
hansemann@kallnet.fo ella tlf. 596110

POWERRIDER TIL SØLU
Ein PowerRider, sum nýggjur, til solu fyri 1500 kr.
Tlf. 317638 eftir arbeiðstið

TIL SØLU
Kompl. dykkaraútgerð til solu.
Tlf. 210518

VASKIBRETTIR TIL SØLU
Gomul vaskibrettir, góð til tøving 175,- uttan fors.
Tlf. 373169/373313

BREYÐSKERARIR TIL SØLU
Gamlir Rádvad breyðskerarir 200 kr. stk. uttan fors.
Ring 373169/373313

Lýsingartekstur

_____

__